# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 8. desember 2009



Talan er um sannan klassikara, tá Juventus í kvøld tekur ímóti Bayern München í Torino

Mynd: Polfoto/AP

# Klassikari í Torino

**Juventus ella Bayern München eru ikki longur partur av Champions League, tá dystirnir í kvøld eru spældir**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Tey bæði feløgini hava við stoltari siðvenju talst millum europisku risarnar, men hvør í sínum lagi hava tey havt sínar trupulleikar at dragast við seinastu árini.

Enn verða tey tó roknað millum stórfeløgini, men avrikini hjá franska Bordeaux hava gjørt, at annað av teimum stóru noyðist yvir í minni prestisjufyltu European League, tá farið verður undir næstu fasuna av eruopiskum steypafótbólti.

## Dystirnir í kvøld

**Bólkur A**
Juventus-Bayern München
Maccabi Haifa-Bordeauc

**Bólkur B**
Besiktas-CSKA Moskva
Wolfsburg-Manchester United

**Bólkur C**
FC Zürich-AC Milan
Marseille-Real Madrid

**Bólkur D**
Atlético Madrid-Porto
Chelsea-Apoel Nicosia

## Støðan í bólkaspælinum

**Bólkur A**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Bordeaux | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 8 | 2 | 6 | 13 |
| 2 Juventus | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 8 |
| 3 Bayern München | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 5 | 4 | 1 | 7 |
| 4 Maccabi Haifa | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 0 | 7 | -7 | 0 |

**Bólkur B**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Manchester Utd. | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 7 | 5 | 2 | 10 |
| 2 Wolfsburg | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 8 | 5 | 3 | 7 |
| 3 CSKA Moskva | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 8 | 9 | -1 | 7 |
| 4 Besiktas | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 2 | 6 | -4 | 4 |

**Bólkur C**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Real Madrid | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 10 |
| 2 AC Milan | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 7 | 6 | 1 | 8 |
| 3 Marseille | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 9 | 7 | 2 | 7 |
| 4 FC Zürich | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 4 | 13 | -9 | 3 |

**Bólkur D**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 9 | 2 | 7 | 13 |
| 2 FC Porto | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 5 | 3 | 2 | 9 |
| 3 Atlético Madrid | 5 | 0 | - | 3 | - | 2 | 3 | 9 | -6 | 3 |
| 4 Apoel Nicosia | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 2 | 5 | -3 | 2 |

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

# Jón Pauli skal venja FC Suðuroy



**Maðurin, sum í ár leiddi VB/Sumba upp í Vodafone-deildina, verður eisini fyrsti venjarin hjá nýggja FC-Suðuroy.**

Hesum hevur FC Suðuroy boðað frá í tíðindaskrivi í morgun.

Jón Pauli hevur verið venjari hjá VB/Sumba tey bæði seinastu kappingarárini, og hann fer nú undir at taka A-útbúgvingina hjá FSF.

Umframt at venjarin nú er settur, sigur felagið seg eisini arbeiða við at styrkja um hópin. Sagt verður, at tosað verður við bæði føroyskar og útlendskar spælarar.

-mørk

# Kyndil-H71 í kvøld

Útsetti dysturin millum hondbóltsharrarnar hjá Kyndli og H71 verður spældur í kvøld.

Ætlandi skuldi dysturin annars spælast leygardagin, men forfall bar við sær, at dysturin varð útsettur.

Vinnarin av dystinum í dag er av álvara aftur við í kapprenningini um at koma í FM-finaluna. Í løtuni situr Neistin trygt á oddasessinum, men StÍF, sum er nummar nummar tvey, tapti sunnudagin og hava teir tí framvegis 10 stig. Kyndil hevur 8 stig og H71 7.

-mørk